

# Bue helst eisini størri enn mett

**Jan Müller**

29.05.2014 - 19:40

Oljan.fo

Týsdagin bleiv kunngjørt, at meiri olja er í Pil-fundinum enn higartil hildið. Sambært Rocksource, sum er eitt av feløgunum í samstarvinum, kunnu millum 90 og 150 milliónir tunnur av olju vera á Pil-leiðini. Tann gamla metingin var millum 50 og 170 milliónir tunnur.

Chris Spencer, stjóri í Rocksource, sigur við Offshore.no, at tað er av stórum týdningi, at tað niðara markið á metingini er hægri enn fyrr mett. Hann leggur afturat, at talan er um eitt týðandi fund, og at tað gerst alt meiri sannlíkt, at talan er um eitt lønandi fund.

Aftan á Pil-brunnin skal pallurin Transocean Arctic (myndin) borað Bue-brunnin, sum er stutt norðan fyri hin, og tað góða úrslitið í grannabrunninum gevur vónir um eitt gott úrslit í Bue-brunninum, skrivar norska heimasíðan.

VNG, sum er fyristøðufelag á Bue og Pil, eigur 30 prosent av loyvinum. Hini feløgini eru Spike við 30 prosentum, Faroe Petroleum við 25 prosentum og Rocksource við 15 prosentum.